# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




## Bilradio á Rás2

**Bilradio verður sent týsdag millum kl. 16 og 17, og endursent fríggjadag millum kl. 8 og 9, og leygardag kl. 17**

# Peugeot 308 SW



*Peugeot 308 SW er stationcar útgávan við panorama-glastaki og møguleika til tvey eykasetur aftast*



*Flúgvaraborð við baksetrini*

**SW útgávan av Peugeot 308 er bilurin til tey, ið hava brúk fyri meira plássi enn í einum vanligum hatchback. Peugeot 308 SW er liðiliga innrættaður og fæst við upp til 7 sitiplássum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Peugeot 308, sum kom á marknaðin í fjør sum hatchback, er nú eisini komin sum stationcar og sum SW. Peugeot 308 SW er ein stationcar útgáva við panorama-glastaki og møguleika til tvey eykasetur aftast.

Peugeot 308 SW er ein eyðkendur Peugeot við stórum opnum kølaragittari og stórum Peugeot-logo mitt framman.

Koyrieginleikar og komfortur eru sum á fronskum bilum, tá teir eru best. Lættur at koyra og merkist sum ein munandi størri bilur, hvat undirvogni og fjaðraskipan viðvíkur.

308 SW er bygdur yvir sama plattform sum hatchback útgávan, men hesin hevur longri aksilfrástøðu og er 22 cm longri. Viðførisrúmið er 674 litrar, og við at leggja baksetrini niður verður vørurúmið umleið 2.000 litrar.



*SW útgávan av 308 er til tey, ið hava brúk fyri meira plássi enn í einum vanligum hatchback*

### Átta ymiskir motorar

Til Peugeot 308 er ein breið motorskrá, sum umfatar fimm bensin- og tríggjar dieselmotorar, sum allir eru umhvørvisvinarligir og økonomiskir. Benzinmotorarnir eru hesir: 1,4 við 95 hk, 1,6 við 120 hk, 1,6 við 150 hk, 1,6 við 140 hk (automatgir), og 1,6 við 174 hk. HDi dieselmotorarnir eru: 1,6 HDi við 90 hk, 1,6 HDi við 109 hk, og 2,0 HDi við 136 hk.

Standard útgerðin umfatar allar tær vanligu trygdarskipanirnar sum t.d. ABS, ESP, EBD og EBA (neyðbremsuskipan), umframt at bilurin fæst við nógvari aðrari útgerð.

Sum standard hevur Peugeot 308 SW sjey airbag, tveir framman, tveir í síðunum, gardinairbag í báðum síðum og knæairbag.

Peugeot 308 SW fæst í útgávunum Comfort Plus, Premium, GT Turbo og Griffe.

Bilurin kann síggjast og roynast hjá Auto Service undir Krákugjógv. Prísirnir byrja við 214.000 krónum.



*Peugeot 308 SW innan. Panorama-glastakið gevur gott ljós í kabinuni*

## FAKTA

**Peugeot 308 SW 1,6 HDi**

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litra HDi (diesel) við 109 hk |
| 0-100 km/t: | 12,5 sek (6-gir) |
| Botntrekk: | 240 Nm við 1.750 snún/min |
| CO2 Útlát: | 134 g/km |
| Oljunýtsla: | 19,6 km/l (blandað koyring) |
| Støðd og vekt | |
| Longd: | 450,0 m |
| Breidd: | 181,5 m |
| Hædd: | 156,0 m |
| Eginvekt: | 1.613 kg |
| Viðførisrúm: | 674 litrar |
| Prísur: | kr. 280.000,- (Premium) |
| Søluumboð: | Auto Service |
| | Undir Krákugjógv |
| | FO-110 Tórshavn |
| | Tel: 34 54 00 |
| | www.autoservice.fo |